


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Fyrr trýtur streymur í á, enn kvinnu tróta ráð



ÓLUVA KLETTSKARÐ
valevni Tjóðveldis

-Soleiðis tóku tey gomlu til, tí so nógv hildu tey av konufólkunum.

-Um konufólk í politikki og á tingi er bert at siga, at tað er so langt út um lágmark, at umboðanin í dag er á markinum til at snúgva seg um illegitimt vald. Vanliga skilja vit í millum legitimt og illegitimt vald. Legitimt vald snýr seg um rættvísa umboðan og rættvíst vald; og harvið eisini um javnvágina í millum tey valdu og tey, ið hava valt hesi. Tá vit hava so lítið samanfall í millum tey, ið sita á tingi samanborið við fólk í samfelagnum, so er skilligt, at her er onki skil á. Fyrst av øllum eru kvinnurnar so dyggiliga undirumboðaðar! Og hvussu við aldursbýti, útbúgving og øðrum?

-Skulu vit føroyingar fremja fult fólkaræði, so er nógv eftir á láni. Tá umleið helmingurin av íbúgvunum er so illa umboðaður í fólkavalda stýri okkara, at altjóða samfelagið hevur talað at hesum, so skulu vit taka hetta í álvara.

-Kanska skulu vit taka tey gomlu upp á orðið og broyta hugburð. Tí kvinnan er ikki ráðaleys, heldur ikki tá á stendur. Hugsið bara um fyrsta kvinnuliga løgmann. Tað mundi neyvan vera av tilvild, at hon slapp framat at rudda upp eftir landsins fúlasta brúksmentan, har ongin hevði havt ábyrgd av nøkrum.

-Tey gomlu goymdu síni hjartamál, sín klókskap og sína vitan í orðatøkum. Hesi eru so skilagóð, at tey sum onki hava staðið í fleiri hundrað ár.

-So tá tey søgdu *fyrr trýtur streymur í á, enn kvinnu tróta ráð*, so er bert eitt at gera: seta kross við eitt kvinnuligt valevni.

-Ein atkvøða til Tjóðveldi tryggjar tær eina framfýsna og eldhugaða røddi, ið tekur fólkaræði í álvara. Og ein atkvøða til tær illa umboðaðu í fólkavaldu sessum okkara, er eisini ein atkvøða til tín og tíni.

# Tjóðargarðar, Toftavatn og Mykineshólmur



HEIDI PETERSEN
Tjóðveldi
www.tjodveldi.fo/heidi

Tað er sera jaligt at tað nú er púrasta "legalt" at tosa um umhvørvi í føroyskum politikki. Í undanfarna valskeiði hevur Tjóðveldi av øllum alvi roynt at varpa ljós á umhvørviðmálini, bæði við uppskotinum um at taka undir við Kyoto avtaluni og við samtyktini um lívfrøðiligt margfeldni.

**Tjóðargarðar í Føroyum**
Eitt av mínum hjartamálum hevur verið at skipa Tjóðargarðar í Føroyum. Uppskotið fekk sera jaliga viðgerð í tinginum, men náddi ikki at koma aftur úr nevndini áðrenn valið var útskriva. Á løgtingi vil eg framhaldandi arbeiða fyri at hetta mál verður samtykt.

Men eisini eru onnur týdningarmikli mál á umhvørvisøkinum, sum liggja á lánið.

**Friða Toftavatn**
Í sambandið við útbyggingina kring Høganes á Toftum, er týdningarmikið at Toftavatn og øki kring vatnið, verður friða. Hetta má gerast fyri í framtíðini at tryggja at útbyggingin ikki skalar tað náttúru perlu sum øki er. Eisini er Toftavatn eitt upplagt øki at skipa sum Tjóðargarð. Tað liggur sentralt, hevur eitt serstakt plantu og fuglalív og eg eitt sjáldsama vakurt umráði í Føroyum. Eisini eru onnur øki í Føroyum sum eru uppløgd mál sum Tjóðargarðar, eitt nú Hvannhagi í Suðuroy og øki kring Gróthúsvatn á Sandi.

Mykineshólmur sum "World Heritage"
Umhvørvið kann eisini vera við at seta Føroyar á heimskortið. Øki sum verðinsnátturufriðingarstovnurin IUCN og UNESCO, ST stovnurin fyri útbúgving, gransking og mentan, geva status sum "World Heritage" gerast altjóða ferðavinnu attraktiónir. Okkara mál innan umhvørvis varðveitslu eigur at vara at vit fáa eitt øki í Føroyum altjóða viðurkent sum "World Heritage"

Røddir hava verið frammi um at Mykineshólmur kundi fingið henda status, hetta er í øllum førum ein møguleiki sum eigur at arbeiðast víðari við.

**X við E - Heidi P**

# Hvat er felags fyri ABC, EDB og BE ?



JASPUR VANG
Løgtingsvalevni
Sambandsflokksins í Suðuroy

Jú, allir hinir flokkarnir savnast um Lista B - Sambandsflokkin - sum harvið við røttum kann sigast at vera miðpunktið og krummtappurin í føroyskum framtíðarpolitikki.

Hesin veruleiki má tó ikki fáa okkum valevni ella trúðfesta veljaraskaran at taka nakað fyri givið og halda, at væl stendur til. Tvørtur ímóti, valstríðið er í hæddini og valmøguleikarnir nógvir.

Tað er tó hugaligt at vera vitni til, at omanfyri nevndu samgongumøguleikar hava verið nevndir sum teir mest sannlíku eftir komandi løgtingsval og ikki minst, at Sambandsflokkurin er felagsnevnarin.

Hví er Sambandsflokkurin størstur ?

Jú, eftir seinasta løgtingsval tók Sambandsflokkurin ábyrgd í samgongu og fekk við m.a. uttanríkispolitisku heimildarlóggávuni greitt viðurskiftini millum ríkispartarnar. Við øðrum orðum, so er Nýskipanaruppskot Sambandsflokksins veruleiki. Møguleikarnir at gagnnýta teir fyrimunir, ið eru í ríkisfelagsskapinum, liggja tí aftur opnir fyri okkum.

At Sambandsflokkurin aftur fekk umboðan á Fólkatingi, var enn ein álitisváttan og enn eitt amboð at styrkja felagsskapin, sum er okkara stóra styrki og lopfjøl út í heim.

Tá valfepurin nú undan løgtingsvalinum fekk tingog landsstýrismenn at missa samgongustevið og vandi gjørdist fyri at missa tamarhaldið á útreiðslum landskassans, tók Sambandsflokkurin ábyrgd og segði frá.

Stutt sagt, veljarin vísti Sambandsflokkinum álit og Sambandsflokkurin tók ábyrgd.

**Hví er vandi í hvørjari vælferð?**
Jú, gamla fullveldssamgongan, sum til alla lukku kollsigldi, helt í áravís føroyska vælferðarsamfelgnum føstum í einari nationalromantiskari naggatódn. Alt ov nógv politisk og fíggjarlig orka varð nýtt til at seta kílar í ríkisfelagsskapin. Hettar bar til, tí viðrák var í landsbúskapinum vegna m.a. góðan fiskiskap og góðar prísir.

Loysingarflokkarnir og ein Javnaðarflokkur, sum í spurninginum um ríkisrættarligu støðu Føroya ikki veit, hvørjum beini hann skal standa á, tóku allir undir við at skerja ríkisveitingina. Úrsliti varð, at føroyskur landsbúskapur síðani 2001 hevur mist 2,5 milliardir krónur. Ein upphædd, sum hevði verið nóg mikið til at rinda fyri eitt nú 3 Sandoyarberghol ella 1 ½ Suðuroyarberghol, ella 1 ½ altjóða flogvøll, fyri ikki at tala um tær ábøtur, sum fyri slíka upphædd kundu verið gjørdar innan skúlaverk, heilsuverk og á eldraøkinum.

Harmiligt var tað, at loysingarflokkarnir ikki kendu sær høgv, tá búskaparligt viðrák var eina løtu, men søplaðu stóran part av ríkisveitingini burtur.

Hettar er tó fortíð nú. Vit mugu læra av gjørdum mistøkum, bróta upp um armar og við áræði ganga alheiminum og framtíðini her á klettunum á møti.

**Gott val**

# Vágar fyrst og síðan framtíðar flogvøll



RODMUNDUR NIELSEN
valevni Fólkaflokksins
á Lista A, sjálvandi!

Nú skal arbeiðast miðvíst fram ímóti at finna ein trygga framtíðarloysn á okkara flogvallarviðurskiftum. Hetta er okkara samband við útheimin. Sum tað fyrsta, er tað neyðugt at útbyggja verandi flogvøll fyri ikki at steðga upp á hesum økinum. Síðan leggja vit okkum eftir at finna fram til og gera neyðugu teknisku kanningarnar, soleiðis at vit kunnu fara undir ein altjóða flogvøll í landinum. Lat sakkunnleikan tala um altjóða vøllurin fer at liggja í Nólsoy, Skorhæddini ella í Søltuvík og lat okkum politikkarar taka okkum av politikki.

# Tað má gerast eitt hjartamál



TORDUR J. NICLASEN
Miðflokkurin
listi H

At tosað um vælferð hevur við gerðansdagin hjá einstaklinginum at gera!

Fortreytirnar, at arbeiði er til allar vinnuførar hendur og at tað altíð skal loysa seg at arbeiða.

Hvussu hevur verkamaðurin tað? Hvussu hevur barnanafamiljan tað? Er tað rætt og rímiligt, at heili 70% av lønini enda aftur í landskassanum ?

Spurningurin um vælferð er eisini ein spurningur um politiska prioritering og at politikarin setur seg inní dagligt dagin hjá borgaranum.

Eitt samfelag eigur at verða mett eftir hvussu tann veikast hevur tað.

Hvat er tað fyri samfelag vit ynskja?

Vit í Miðflokkinum ynskja eitt samfelag, har øll hava somu rættartrygd , fyrst og fremst rættartrygd til sjálvt lívið og tey, sum ikki í fult mát orka ella megna –tey og avvarðandi teirra, standa møguleikar í boðið, sum tey kenna seg **trygg** við.

Við tað, at Miðflokkurin raðfestir øðrvísi og tað er honum eitt **hjartamál**, at stríðast fyri teim menniskjuligu virðinum – t.v.s. dagligdegnum hjá tí einstaka borgaranum, so er Miðflokkurin ein trygd fyri, at tey sum eru við skerdan lut hvat heilsu og førleika viðvíkur – og avvarðandi teirra -fáa møguleikar hava tilboð av ymiskum slagi og soleiðis koma at merkja, at í hesum kæra fosturlandi okkara , eisini er pláss fyri teimum – á líkafóti við onnur

Fyrst tá kunnu vit av sonnum tosa um eitt vælferðarsamfelag.